Samgongan fær stóra undirtøku

Fólkaflokkurin og Tjó›veldisflokkurin høvdu veri› stóru vinnararnir, var val í dag. Sambandsflokkurin hev›i eisini fingi› gott útslit, me›an Javna›arflokkurin og serliga Sjálvst‡risflokkurin høvdu havt afturgongd

VELJARAKANNING
John Johannessen

Teir bá›ir stóru samgonguflokkarnir, Tjó›veldisflokkurin og Fólkaflokkurin fáa dygga undirtøku í n‡ggjastu veljarakanningini, sum Dimmalætting almannakunngjørdi í gjár.

Tilsamans høvdu hesir bá›ir flokkarnir fingi› 48,4 prosent av samla›u atkvø›unum. Og ver›ur tri›i samgonguflokkurin taldur vi›, hev›i núverandi samgonga fingi› 52,2 prosent av samla›u atkvø›unum og sostatt meiriluta á tingi.

Helena Dam á Neystabø og Sjálvst‡risflokkurin hvørva so at siga úr samgongumyndini sambært seinastu veljarakanningini me›an Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal alsamt styrkna

Orrustan onga ávirkan

Besta úrsliti› fær Tjó›veldisflokkurin. N‡ggjasta kanngingin gevur honum heili 26,0 prosent av samla›u atkvø›unum.

Í næstseinastu kanningini, sum var› gjørd fyri einari viku sí›ani, fekk Tjó›veldisflokkurin 25,3 prosent. Sostatt er talan um eina framgongd fyri Tjó›veldisflokkin á 0,7 prosent seinastu tvær vikurnar, hóast orrustuna, sum stó›st av, at ein av landsst‡rismonnum tjó›veldisfloksins alment n‡tti ókvæmisor› um løgmann og sí›ani seg›i ósatt í almennum tí›indaskrivi.

Høgni Hoydal seg›i vi› Dimmalætting í gjár, at hann var ikki sørt ovfarin av hesum gó›a úrsliti. Hann heldur, at kanningin s‡nir, at fólk hava álit á, at Tjó›veldisflokkurin ætlar sær at gjøgnumføra fullveldisætlanina, hóast hann hevur gjørt sjálvmál, sum betur vóru ógjørd.

Betur enn vali›

Fólkaflokkurin fær vanliga ikki tey bestu úrslitini til veljarakanningar. Hetta er eisini komi› til sjóndar í teimum kanningunum, sum eru gjørdar sí›ani seinasta val.

Men í hesari n‡ggjastu kanningini er úrsliti› hjá Fólkaflokkinum betur enn vi› vali› í 1998. Vali› gav Fólkaflokkinum 21,3 prosent, me›an n‡ggjasta veljarakanningin gevur flokkinum 22,4 prosent av atkvø›unum.

Í kanningini, sum var› gjørd fyri fjúrtan døgum sí›ani, fekk Fólkaflokkurin 19,2 prosent. Sostatt er talan um eina framgongd á 3,2 prosent seinastu tvær vikurnar.

Hetta er ein ógvuliga stór framgongd, serliga tá hugsa› ver›ur um, at Fólkaflokkurin vanliga ikki gó› úrslit í veljarakanningum. Men møguliga er orsøkin til framgongdina tann, at løgma›ur, sum persónliga fær ógvuliga stóra undirtøku frá veljarunum, hevur sta›i› ógvuliga sterkur og hildi› upp á sítt, me›an órógv hevur veri› í samgonguni seinastu tí›ina.

Anfinn Kallsberg velur tó at taka n‡ggjastu veljarakanningina vi› ógvuliga stórum fyrivarni.

Draga hvør sín veg

Sambandsflokkurin er í n‡ggjastu veljarakanningini næststørsti flokkur. Hann fær 22,8 prosent av atkvø›unum og 8 tingmenn.

Vi› vali› í 1998 fekk Sambandsflokkurin 18 prosent og 6 tingmenn. Sostatt er talan um eina stóra framgongd. Eina framgongd á 2,8 prosent í atkvø›ub‡tinum og eina framgongd á tveir tingmenn í tingmannatalinum.

Beint øvugt gongur ta› hjá hinum stjóra andstø›uflokkinum, Javna›arflokkinum. Kanngingin gevur Javna›arflokkinum 21,0 prosent av atkvø›unum. Hetta er ein afturgongd á 0,9 prosent samanbori› vi› vali› í 1998 og ein afturgongd á 1,2 prosent samanbori› vi› kanningina fyri tveimum vikum sí›ani. Tann kanningin gav Javna›arflokkinum 22,2 prosent.

Søgu- og samfelagsdeildin hevur gjørt veljarakanningina í sambandi vi› eina próvtøkuuppgávu.

Næmingarnir ringdu seinasta hósdag og fríggjadag til umlei› 900 fólk og fingu svar frá 623 fólkum.

Næmingarnir hava valt tilvildarligt út eftir telefonbóknini og bi›i› um at sleppa at tosa vi› tann í húsinum, sum seinast hev›i fø›ingardag.

Polarisering

Gó›u úrslitini hjá Tjó›veldisflokkinum og Fólkaflokkinum á ø›rum veinginum í sjálvst‡risspurninginum og Sambandsflokkinum á hinum veinginum í sjálvst‡risspuringinum eru helst tekin um áhaldandi polarisering í hesum máli.

Hetta sæst eisini aftur í úrslitunum hjá ávikavist Sjálvst‡risflokkinum og Javna›arflokkinum, sum hava ein heldur hovligari stig fyri stig politikk í sjálvst‡risspurninginum. Hesin bá›ir flokkarnir eru teir, sum hava havt størstu jøvnu afturgongdina seinastu veljarakanningarnar.

Tó er at siga, at Javna›arflokkurin fekk heili 23,7 prosent í veljarakanningini í juni í ár samanbori› vi› 21,9 prosent til vali›. Men hesar bá›ar seinastu veljarakanningarar hevur talan veri› um stóra afturgongd, hóast flokkurin sambært veljarakanningini var›veitir allar 7 tingsessirnar.

Atkvø›ub‡ti:

Løgtingsvali›		juni 2000	16. nov.	4. des.
A	21,3	15,5	19,2	22,4
B	18,0	26,7	23,3	22,8
C	21,9	23,7	22,2	21,0
D	7,2	4,2	5,4	3,8
E	23,8	26,4	25,3	26,0
KrF	2,5	0	0,6	0,6
Mi›fl.	4,1	3,5	3,2	3,4

Tingmannab‡ti:

	Seinasta val	kanning	broyting
A	8	7	-1
B	6	8	+2
C	7	7	0
D	2	1	-1
E	8	9	+1
KrF	0	0	0
Mi›fl.	1	0	-1

Hev›i rokna› vi› betri úrsliti

Sjálvst‡risflokkurin er sambært n‡ggjast veljarakanningini einans 0,1 prosent oman fyri marki›, i› krevst fyri at fáa umbo›an á tingi

VELJARAKANNING
John Johannessen

Veljarakanningin, sum Dimmalætting almannakunngjørdi í gjár, gevur Sjálvst‡risflokkinum ein part á 3,8 prosent av samla›a atkvø›utalinum.

Fyri at sleppa á ting krevst, at ein flokkur í minsta lagi fær 3,7 prosent av samla›a atkvø›utalinum. Tískil liggur Sjálvst‡risflokkurin ógvuliga tætt vi› at dumpa, um løgtingsval var› skriva› út nú. Harafturat misti Sjálvst‡risflokkurin eisini sítt umbo› í Tórshavnar b‡ra› eftir kommunuvali›.

Hetta heldur Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›ur fyri Sjálvst‡risflokkin vera løgi, nú samgongan hevur tiki› politikkin hjá Sjálvst‡risflokkinum til sín í spurninginum um ríkisrættarligu stø›una.

– Eg hev›i rokna› vi›, at veljararnir fóru at løna okkum betur, fyri at vit nú hava fingi› restina av samgonguni at taka undir vi› okkara politikki á sjálvst‡risøkinum, og at vit harafturat hava megna› at skapt fri› á Landssjúkrahúsinum og lagt grundarlag undir eina n‡ggja pensjónsskipan, sigur Helena Dam á Neystabø.

Men samstundis vísir Helena Dam á Neystabø á, at Sjálvst‡risflokkurin fekk eina undirtøku á 5,4 prosent til veljarakanningina, sum var› gjørd fyri tveimum vikum sí›ani.

– Eg rokni vi›, at hetta hongur saman vi›, at smáir flokkar hava ilt vi› at sláa ígjøgnum í veljarakanningum, sigur Helena Dam á Neystabø, sum nú í størri mun fer at leggja seg eftir at fáa bo›skapin hjá flokkinum fram.

Helena Dam á Neystabø undrast á vánaliga úrsliti› hjá Sjálvst‡risflokkinum, eftir at landsst‡ri› hevur tiki› leistin hjá Sjálvst‡risflokkinum í fullveldismálinum til sín

7,6 milliónir eyka til landsst‡ri›

Karsten Hansen hevur bi›i› løgtingi› samtykkja eykafíggjarlóg, sum økir útrei›slurnar vi› 7,6 milliónum. Talan er um pengar, sum fíggjarnevndin hjá løgtinginum longu hevur játta› til mál, sum hava skund

EYKAJÁTTAN
Magnus Dam

Ta› størsta útrei›slan í eykafíggjarlógini fyri 2000 er 4,3 milliónir krónur, sum fíggjarnevndin játta›i eftir skri›ulopini í heyst. Ta› hev›i skund at játta peningin, so bøtast kundi um vegakervi›, og tí samtykti fíggjarnevndin eitt fíggjarnevndarskjal uppá 4,3 milliónir krónur.

Men hóast fíggjarnevndin longu hevur játta› peningin eina fer›, so ásetir st‡risskipanarlógin, at øll fíggjarnevndarskjøl skulu leggjast fyri løgtingi› í einari eykafíggjarlóg á›renn 31. desember. Løgtingi› skal samtykkja allar eykajáttanir, sum fíggjarnevndin frammanundan hevur játta›.

Talan er um seks eykajáttanir. Tann næstsørsta er 1,4 milliónir krónur, sum fíggjarnevndin játta›i til at leiga avloysaraskip fyri Dúgvuna, sum tók botn í Leirvík. Harumframt hevur fíggjarnevndin játta› einum organdonori 100.000 krónur í endurgjaldi fyri lønarmiss. Ein yvirlækni á Su›uroyrar sjúkrahúsi hevur fingi› 992.000 krónur í endurgjaldi fyri mist vaktargjald. Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur hækka› lønarkarmin 327.000 krónur, og tann sí›sta eykajáttanin fór til Føroya sjómanskúla, sum skuldi brúka 471.000 krónur til at leiga eitt skip til siglingarvenjing hjá næmingunum.

Talan er um 7.590.000 krónur tilsamans, og løgtingi› vi›gjørdi máli› fyrstu fer› á tingfundinum seinnapartin í gjár.

Pensjónir undantiknar ALS-gjaldi

Fyrití›arpensjónistar og fólk, sum fáa tænastumannaeftirløn skulu ikki gjalda arbei›sloysisskipanini pengar av pensjónini, tey fáa

LÓGARBROYTING
Magnus Dam

Landsst‡risma›urin í arbei›smarkna›armálum, Bjarni Djurholm, hevur skoti› upp at broyta lógina um ALS og arbei›sávísingina, so ávísir bólkar sleppa undan at gjalda pengar í arbei›sloysisskipanina.

Talan er um tey, sum fáa hægstu fyrití›arpensjón, tey sum eru yvir 60 ár og fáa mi›al fyrití›arpensjón og so tey, sum fáa tænastumannaeftirløn. Tey, sum fáa uppihalds- og barnapengar skulu heldur ikki gjalda í skipanina av hesum pengunum.

Sum lógin ver›ur umsitin í dag, so gjalda hesi fólkini ikki til skipanina, men kærunevndin hjá ALS hevur tiki› avger› um, at gjald eigur at ver›a kravt av hesum inntøkunum. ALS heldur ta› kortini ikki vera rætt, at hesi, sum fáa pensjón og a›rar inntøkur, skulu gjalda í skipanina, tí tey eru ikki á arbei›smarkna›inum og hava sostatt heldur ikki møguleika at fáa ágó›a av arbei›sloysisskipanini. Ta› er ímóti prinsippinum í arbei›sloysisskipanini, at fólk gjalda í skipanina, sum ikki hava rætt til útgjald úr skipanini. Lógarbroytingin skal tryggja, at so ver›ur í framtí›ini.

Lógarbroytingin fer at kosta ALS umlei› 750.000 krónur í mistum inntøkum. Pensjónistar og onnur var›veita umlei› 375.000 krónur, sum tey annars skuldu havt goldi› í skipanina, vinnan sparir umlei› 275.000 krónur, og landi› og kommunur umlei› 100.000 krónur tilsamans, um broytingin ver›ur samtykt.

Og at meta eftir 1. vi›ger› av uppskotinum, so er líkt til, at stórur meiriluti er í løgtinignum fyri at broyta lógina.

Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum, á Jólatinginum ella í Vinnuhúsinum.

JÓLATING 2000

Vit bjóða til Jólating 13. desember á Hotel Føroyum kl. 18.00. Umframt kulinariskar delikatessur, borðreiða vit við kveikjandi hugleiðingum.

Johan Poulsen fer at siga frá lívi og arbeiði sínum á einum borðipalli, **Ben Arabo** tosar um oljuvinnuna sum vinnuveg, og **Eyðun Andreassen** hugleiðir um, hvussu vit føroyingar samskifta.

Vinarliga melda til í Vinnuhúsinum á telefon 311864 - ella um teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi 8. desember.

Vælkomin

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ